SETHÚSAMARKNAÐURIN

## HÚS TIL SØLU



**Lyklaklár íbúð við Marknagilsvegin**
Talan er um eina sera snøgga íbúð, sum er gjørd úr besta tilfari. Varmi er í øllum gólvunum. Bæði uppvaski- og vaskimaskina fylgja við. Gott útsýni og sólargangur.
Íbúðin er 67 m² + úthús. Byggiár: 2003
**Kostnaður: Kr. 1.100.000,- ella hægsta boð yvir**



**Sethús í Hósvík**
Húsini eru í góðum standi, og standa í fríum barnavinarligum umhvørvi við góðum útsýni.
Støddin á húsunum er 147,7 m² + loft og krúpikjallara.
Grundøkið er 731 m².
Byggiár: 1989.
**Kostnaður: Hóskandi boð ynskist.**



**Ognin Heiðavegur 72, Saltangará**
Verður nýtt sum skrivstovubygningur og hevur netútbúnað.
Kann eisini nýtast sum sethús.
Húsini eru 79 m² + loft 66 m². Alt er innrættað.
Grundøkið: 442 m². Húsini eru høvuðsumvæld í 1991.
**Kostnaður: Hóskandi boð ynskist**



**Sethús Norðuri í Gerði 37, Fuglafjørður**
Vælhildin sethús við úthúsi í tveimum hæddum (24 m²).
Húsini eru høvuðsumvæld bæði uttan og innan.
Støddin á sethúsunum er: 43,5 m² + loft v/trimpli + kjallara.
Grundøkið er 330 m². Byggiár: 1934-35. Umvæld í 2003.
**Kostnaður: Hóskandi boð ynskist**

Áhugað verða biðin um at ringja ella støkka inn á gólvið hjá Húsamekling.
Her kunnu vit greiða nærri frá ognini, og avtala tíð at sýna húsini fram.

**HÚSAMEKLING**
Sp/f Protek · Vaglið · Box 331 · 110 Tórshavn
Tel 319321 · Fax 319331 · protek@post.olivant.fo · www.husamekling.fo

Sosialurin 341800

**MARINARGØTA 9, HOYVÍK TIL SØLU/LEIGU**



Um hóskandi boð fæst, verða sethúsini Marinargøta 9 seld/útleigað.

**Nærri upplýsingar fáast á tel 310 174 ella 210 174**

## Hús til sølu

Magnus Heinasonargøta 17 er til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 312659**

## Summarhús

dubult, bjálvað húsbyngja til sølu. Hevur íbinding til el, vatn og sanitet. Køkur við køliskápi, wc-brúsa og kamar/uppihaldsrúm.

**Tlf. 458811 ella 273355**

## Hús í Vági til sølu

Matr. nr. 0181A

Eldri hús (49 fermetrar) beint oman fyri keiina, mitt í Vági, til sølu til hægstbjóðandi.

Húsini eru í ringum standi og krevja ábøtur.

**Tlf. 214226**

í Sosialinum
verða
húsini seld

SETHÚSAMARKNAÐURIN

**Sosialurin**
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



Finn dreymahúsið
í Sosialinum

SETHÚSAMARKNAÐURIN

**Vikuskifti**

Nr. 193 • vikuskiftið 9.–10. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Er Turkaland partur av Evropa?



Síða 8

# Havnarkórið heiðrar Højgaard



68 ára gamli Eyðun Simonsen úr Klaksvík minnist ikki sín brúdleypsdag. Ei heldur barnadagarnar hjá teimum trimum synunum, ella nógvar av sínum egnu upplivingum. Hann hevur gloymt, at mjólk eigur at standa í køliskápinum, og tá hann fer út, kann tað verða, at hann ikki finnur heim. Eyðun hevur Alzheimer og missir spakuliga sítt lív burtur

KONSERT

*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Tað varð herfyri dyggiliga staðfest at tónaskaldið og kórleiðarin Hans Jákup Højgaard, sáli, eigur eitt serstakligt pláss í hjørtunum hjá føroyskum mentafólki: í sambandi við hansara 100 ára føðingardag hava nevniliga Toftir verið miðdepil fyri stórum og virðiligum tiltøkum. Men Hans Jacob Højgaard búði og virkaði eisini í nógv í høvuðsstaðnum, og nú vil Havnarkórið eisini vísa honum ein hóskandi heiður gjøgnum eina stóra konsert í Norðurlandahúsinum sunnudagin 10. oktober, við luttøku av bæði Havnarkórinum, Kirkjukórinum í Fríðríkskirkjuni, Føroya Symfoniorkestri og fleiri øðrum frægum.

Ein av høvuðspersónunum aftan fyri tiltakið er dirigenturin ið skal stjórna Havnarkórinum sunnudagin, Ólavur Hátún. Kórleiðarin og tónleikalærarin Hátún, ið bæði persónliga og yrkisliga kendi væl H. J. Højgaard, hevði ilt við at dylja sín eldhuga fyri heiðurs tiltakinum hjá Havnarkórinum við stuðli frá Norðurlandahúsinum og Tórshavnar Býráð.

»Nú gjørdu toftafólk eina røð av sera væl eydnaðum og fínum tiltøkum til minnis um Hans Jacob, hvat ið eisini var hóskiligt í allar mátar,« segði Ólavur Hátún. »Tó eru vit mong ið halda at Havnin sum høvuðsstaður eisini átti at víst virðing fyri hesum úrmælingi innan føroyskt kórlív, við at skipa fyri einum ordiligum tiltaki. Tí hava vit, við góðari hjálp frá Norðurlandahúsinum og Tórshavnar Býráð, arbeitt hart fyri at fáa í lag eina stóra konsert í hesum høpi.«

### Leitaði til røturnar

Á húsanum til eina komandi fløgu við tónleiki eftir H. J. Højgaard skrivar Ólavur Hátún fylgjandi undir yvir skriftini 'Kórleiðarin og tónaskaldið Hans Jacob Højgaard':

»Í føroyskari songsøgu eigur H. J. Højgaard eina serstøðu, bæði sum kórleiðari og komponistur. Longu tá ið hann á fyrsta sinni seinast í 30-árunum kom suður til Havnar við sínum Toftakórum, var tað fólki greitt at her var byrjan til nýggjan gróður í føroyskum kórlívi.

Vit sum í 40-árunum vóru farin at vita tónleikaliga til okkum, fara ongantíð at gloyma tær árligu kórvitjaninar av Toftum. Hetta var kórsangur í serklassa, hugtakandi í sínum vælljóði og dynamikki og sermerktur av samspælinum millum kór og leiðara.

Tað bar so væl á at eg ungur kom at læra hendan merkismann at kenna, og minnini um samverur við hann í hansara heimaumhvørvi á Toftum sita mær enn sterkt í huganum. Bæði tá og seinni sum sangari í Havnar Sangfelag upplivdi eg Hans J. Højgaard sum kórleiðara við heilt serstakari persónligari útstráling. Minniligt dømi um hetta var konsertin í á norðurlendskari kórstevnu í Oslo í 1954, har Hans Jákup rættiliga hevði okkum sangarar á lofti og við sínari persónsmensku birti slíkan fagnað í Nationalteatret tað kvøldið at okkara lutur, fram um tann hjá elitukórum úr øllum hinum Norðurlondum, fekk rómandi endurljóð í norskum bløðum.

Sum tónaskald gav H. J. Højgaard skilliga til kennar at hann hevði støði í gamlari føroyskari song- og kvæðamentan. Faðirin Dánjal Jákup Højgaard var tiltikin kvæðakempa og Kingo-sangari sum fáur. Sjálvur hevði eg høvi at hoyra hendan tignarliga mann syngja gomul føroysk sálmaløg, soleiðis sum tey vóru varðveitt har í sókníni í øldir. Tann løtan í bóndans stovu inni á Regni gongur ikki frá mær aftur. Eisini í hina ættina hevði Hans Jákup gott í at bregða. Móðirin var systir Fríðrik Petersen, próst, sum fram um aðrar legði lunnar undir nýggjari føroyskan songskaldskap, og umframt tað bókliga hevur hetta fólkið inni í Saltnesi eisini sýnt góðar tónleikaligar gávur.

Løgini hjá Hans Jákupi sum sýna árin av hesum forna arvi eru mong. Av teim kvæðakendu kunnu nevnast kantatan 'Fedranna tala', løgini til sangirnar 'Tá ið teir sóu landið' ( Hans A. Djurhuus), 'Her leikti tær lendið' (Chr. Matras) og 'Nú sprettur á fold og spírar' (Andreas Andreasen) og sálmalagið til 'Tey ið fylgjast frá vársins tíð' (Jákup Dahl). Í Læraraskúla Kantatuni eru dømi um bæði kvæða- og Kingo-tóna, og annað dømi um henda seinna er lagið til sálmin 'Tað lið er trongt' ( Hans M. Jacobsen). Talan er tó ongantíð um eftirgerð, heldur eru tað sjálvstøðug, mergjað løg, ið bera boð um tað jørðildi tey eru sprottin av.

At eisini læriárini í Danmørk fingu týdning fyri Hans Jákupsa skapandi virki er eyðskilt. 1930-árini vóru ein serlig gróðrartíð í danska sangheiminum. Carl Nielsen og Thomas Laub, ið vóru undangongumenn í hesari sangligu veking, høvdu tá í eini 15-20 ár strembað eftir at fáa sálmasangin og fólksliga sangin í Danmark burtur frá tí solokenda romancusanginum úr 19. øld og inn á melodiskt einfaldari og fornari ræsur ið gingu aftur til miðaldar fólkatóna og upprunaligan lutherskan sálmasang.

Og júst um tað mundið tá Hans Jákup kom á læraraskúla í Danmørk, høvdu hesir tónar vunnið sær afturljóð. Gamli sanglærari hansara Kristen Steensen, ið sum sangkomponistur hevði sítt støði í tí seinromantiska, trúði ikki upp á nýggja sangidealið; men hjá unga føroyska listamanninum rinu hesir forn-nýggju tónar, ið fullu so væl í tráð við gamla føroyska lagakenslu, beinanvegin við. Tað kann tí vera ilt at meta um hetta ella hatta lagið hjá Hans J. Højgaard sipar til hesa ella hasa fyrimyndina. Um sálmaløgini man tað tó vera rætt at siga, at tey flestu benda aftur á Th. Laub, sum Hans Jákup allar sínar dagar var so serstakliga hugtikin av. Ikki var tað við órøttum at okkara felags vinur Karl Clausen kallaði hann 'Nordatlantens ensomme laubianer'.«

### Góð dømi um løg

Konsertin í Norðurlandahúsinum sunnudagin klokkan 16 skal geva eina fjølbroytta og livandi tónamynd av nøkrum av teimum kendastu verkunum eftir H.J. Højgaard; harumframt eru tvær kompositiónir eftir sonin Dan Højgaard á skránni og ein kompositión eftir Jóhan Restorff Jacobsen umframt tvey arrangement eftir Sunleif Rasmussen, eitt eftir Otto Mortensen og eitt eftir Svend S. Schultz.

Tey luttakandi eru Havnarkórið, eitt felagskór samansett av Havnarkórinum og Kirkjukórinum í Fríðríkskirkjuni og Føroya Symfoniorkestur; sopransolistur: Berghild Poulsen; klaver: Jóhannes Andreasen; upplestur: Frits Johannesen; dirigentar Ólavur Hátún (kór) og Steven Foggen (orkestur).

Tað fer eisini at liggja væl fyri at fylgja við í tekstunum til sangirnar og upplesturin eftirsum hesir skulu standa at lesa í fullari longd í skránni, skilst. Og fyri tey sum ikki eru so medvitað um júst hvørji løg H. J. Højgaard hevur skrivað, so skal konsertin kunna geva nøkur góð dømi.

Tiltakið byrjar annars við inngangs orðum frá Óla Breckmann; síðani fara kórini í gongd, í summum førum Havnarkórið, í øðrum førum felagskórið. Fyrst hoyra vit 'Tá ið teir sóu landið' við orðum eftir Hans A. Djurhuus; síðani kemur 'Eg oyggjar veit' við orðum eftir Fríðrik Petersen, harnæst 'Nú sprettur á fold' við orðum eftir Mikkjal á Ryggi, síðani 'Í Sundalagnum ein sólskinsdag' við orðum eftir Rikard Long, so 'Summarmáli' við orðum eftir Georg L. Samuelsen, og aftan á tað kemur lagið 'Heyst' eftir Dan Højgaard til yrking hjá Tummas Napoleon Djurhuus; næsta lag er 'Heystkvøld' við orðum eftir Jeffrei Henriksen, og seinast áðrenn steðgin skulu vit hoyra 'Boð og Birting' (eisini kallað 'Studentaskúla Kantatan') í nýggjari útgávu arrangerað av Sunleif Rasmussen, orð eftir Karsten Hoydal.

Aftan á steðgin verður lagt fyri við klassikaranum 'Tíðin rennur' við orðum eftir Fríðrik Petersen og klaversatsi eftir Otto Mortensen, sum somuleiðis hevur gjørt klaversatsin til lagið ið kemur beint aftan á, nevniliga 'Dagurin aftnar' við orðum eftir Hans Michael Jacobsen; næsta lag er 'Pápi mín hann strevar og hann stríðir' við orðum eftir Hans A. Djurhuus, síðani kemur 'Góða mamma, kom nú' við orðum eftir Marius Johannesen; tað næsta lagið er komponerað av Jóhan Restorff Jacobsen, nevniliga 'Kvøða til Hans Jákup' ið Hans Thomsen yrkti; næst kemur 'Hon stóð har við rokkin og spann' við orðum eftir Hans A. Djurhuus, síðani eitt lag eftir Dan Højgaard til yrkingina 'Lítlan' eftir Tummas Napoleon Djurhuus; næsta lag er 'Nú ferðast fólk fyri nesini' við orðum eftir Christian Matras, harnæst 'Í Noreg búðu raskir menn' við orðum eftir Símin M. Zachariassen; næst á skránni er tann instrumentala 'Højgaard Suitan' arrangerað av Svend S. Schultz fyri orkestur, harnæst kemur 'Fedranna tala' (eisini kallað 'Kommunuskúla Kantatan') við teksti eftir Heðin Brú, og seinast á skránni er 'Tórshavn' við orðum eftir Poul F. Joensen, í nýggjum satsi eftir Sunleif Rasmussen.